Sirið Stenberg
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um Atlantsflog, settur landsstýrismanninum við fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hevur Atlantsflog borið so í bandi, at uppsøgdu starvsfólkini í felagnum hava havt møguleika at fingið endurnýggjað tey ymisku loyvi, skjøl o.a., sum eru neyðug fyri at varðveita teir førleikar, sum skulu til fyri at røkja størvini?

2. Um ja, hvussu nógv fólk er talan um?

3. Um nei, hevur Atlantsflog nakrar ætlanir um at lata uppsøgdu starvsfólkini fáa møguleika at endurnýggja skeið, skjøl og annað neyðugt fyri starvið?

4. Nú flogferðalan væntandi tekur seg upp aftur, er ætlanin so at seta nøkur av størvunum aftur?

Viðmerkingar:
Flogferðslan um allan heim hevur merkt sviðan av koronu, og Føroyar eru einki undantak. Áðrenn jól varð eykajáttan latin Atlantsflog á 100 mió. kr., tí fíggjarliga støðan hjá felagnum var sera trupul. Eitt samt Løgting tók undir við eykajáttanini.

Frammanundan hevði Atlantsflog sagt eini røð av starvsfólkum úr starvi. Tí vóru eisini viðmerkingar í álitinum hjá Fíggjarnevndini frá umboðunum hjá Tjóðveldi og Javnaðarflokkinum um støðuna hjá uppsøgdu starvsfólkunum. Víst varð á, at tað varð mett at kosta felagnum á leið 500 tús. kr. at latið uppsøgdu starvsfólkini fingið møguleika at tikið tey skeið og annað, sum eru neyðug fyri at fáa ymisk skjøl og loyvi til tess at kunna varðveita teir førleikar og tey krøv, sum arbeiðið setir. Umboðini hjá Tjóðveldi og Javnaðarflokkinum mæltu í álitinum til, at hetta varð gjørt, og til 3. viðgerð varð eisini sett fram eitt broytingaruppskot um at játta 500 tús. kr. afturat til júst hetta endamálið, men hetta broytingaruppskotið fall. Tað sæst eisini í miðlunum, at onnur útlendsk flogfeløg í líknandi støðu hava gjørt hetta, m.a. SAS.

Tí hesir spurningar fyri at vita, hvussu støðan hjá uppsøgdu starvsfólkunum er. Vónandi er koronukreppan við at hasa av, og flogferðslan á veg uppaftur. Tá kann tað vera ein fyrimunur at hava starvsfólkini tøk aftur, og at tey eru ajour við skeiðum og øðrum, ið millum annað mekanikarar og flogskiparar regluliga skulu hava fyri at varðveita teir førleikar, sum skulu til fyri at røkja størvini.

Á Løgtingi, 9. mars 2021

Sirið Stenberg